


# Nýggja fløgan hjá FAROE 5 í Miðlahúsinum

**Kom oman í Miðlahúsið aftan á skúlatíð fríggjadagin...**

**TÓNLEIKUR**

*Jonhard Hammer*
*jonhard@sosialurin.fo*

Seinnapartin fríggjadagin verður stórt útgávutiltak við gentubólkinum FAROE 5 í Miðlahúsinum í Vágsbotni.

Har fara tær fimm: Asta, Vígdis, Ragnhild, Jónvá og Lillian at framføra nøkur løg og at signera nýggju fløguna, sum eisini fæst til keyps í Miðlahúsinum.

Hetta er fyrsta heila fløguútgávan hjá gentubólkinum FAROE 5. Á fløguni eru tíggju sterk løg, harav fimm ensk og fimm føroysk. Okkurt er eisini blandað enskt og føroyskt. Thor Simonsen rappar á tveimum av løgunum.

Øll, sum koma oman í Miðlahúsið fáa okkurt lekkurt at leska sær við.

Rás 2 sendir beinleiðis frá tiltakinum, sum er alment og ókeypis.